**Listaleypurin**

Viðv. arbeiði í Listaleypsnevndini, so er ikki annað at siga, enn at vit hava verið til nakrar fundir, fyrst ein kunnandi og síðani til ein fund, har vit valdu út fimm verkætlanir av teimum 10 innkomnu umsóknunum. Av tí at hetta var 1. ferð, var avgjørt ikki beinanvegin at velja allar 10, sum eftir ætlan skulu vera í ár, tí umsóknarfreistin hevði verið so stutt fyrstu ferðina, bert ein knappur mánaði. Hetta hevði sjálvandi borðið við sær, at nógvar av umsóknunum vóru ófullfíggjaðar og at nevndin tí ikki hevði nakað veruligt grundarlag at velja út frá. Nýggj lýsing kemur í bløðini 1. dagin til tær næstu 5 verkætlanirnar.

<u>Stutt lýsing av Listaleypinum:</u>

"Listaleypurin er ein mentanarlig verkætlan, sum Norðurlandahúsið, Mentamálaráðið og kommunurnar skipa fyri til tess at geva fólkaskúlanæmingum høvi at uppliva góða yrkislist. Frá 2008 til 2010 er Listaleypurin ein royndarverkætlan, har tíggju listaverk verða vald hvørt árið. Dentur verður lagdur á at náa ymsum aldursbólkum og at spjaða sýningarnar um alt landið. Sýningarnar eru ókeypis hjá skúlunum.

Lærarar og næmingar kunnu í felag bíleggja listaverk, og verkætlanarleiðarin skipar fyri framførsluskrá í samráði við skúlarnar og listafólkini. Fyrimyndin er eitt norskt átak, ið ber heitið „Den kulturelle skolesekken.“ Henda verkætlan hevur fleiri ár á baki og røkkur nú um alt landið við fleiri hundrað framsýningum um árið.

Fyriskipararnir vóna, at royndarverkætlanin, sum sjálvsagt er avmarkað í mun til tal av skúlum og listaverkum,skal mennast til eitt átak, sum í framtíðini fer at fevna um alt landið, eins og gongdin hevur verið í Noregi. Stigtakari til verkætlanina er Hedvig Westerlund-Kapnas gjøgnum Norðurlandahúsið

Rakel Helmsdal